FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 29. mai 2021
J. nr.: 21/08852-2

Svar uppá fyrispurning nr. 52-146/2020 frá Bjarna K. Petersen, løgtingsmanni, settur, Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um meirvirðisgjald á ferðaleiðaravirksemi.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er landsstýrismaðurin samdur við tulkingini hjá TAKS um, at ferðaleiðarar skulu leggja meirvirðisgjald á sítt vinnuliga virksemi?
2. Hvat fyri eykainntøkur kann landskassin rokna við í samband við, at ferðaleiðarar nú skulu rinda meirvirðisgjald av sínum tænastum?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at tryggja, at ferðaleiðarar ikki skulu rinda meirvirðisgjald, hóast TAKS hevur staðfest eina aðra lógartulking grundað á MVG-lógina?

Svar til nr. 1
TAKS er skattamyndugleiki í Føroyum, og TAKS er tulkingarmyndugleiki í sambandi við meirvirðisgjaldslógina og aðrar skatta- og avgjaldslógir. TAKS og Skatta- og avgjaldskærunevndin eru komin til somu niðurstøðu viðvíkjandi spurningin, um ferðaleiðarar skulu leggja meirvirðisgjald á sítt virksemi. TAKS hevur boðað frá, at broytingin fær virknað frá 1. januar 2022.

Tað eru fleiri spurningar um meirvirðisgjald og ferðavinnu, sum TAKS ynskir svaraðar. Landsstýrismaðurin hevur sett ein arbeiðsbólk umboðandi Fíggjarmálaráðið, TAKS og Ferðavinnufelagið at kanna galdandi meirvirðisgjaldslóg við atliti at ferðavinnuni. Við tað, at arbeitt verður við spurninginum, metir Fíggjarmálaráðið, at tað er ov tíðliga at siga, hvussu meirvirðisgjaldsreglurnar eiga at vera við atliti at ferðaleiðarum.

Svar til nr. 2
Til ber ikki at siga neyvt, hvussu stóra upphædd talan er um í sambandi við meirvirðisgjald á ferðaleiðaravirksemi. Fíggjarmálaráðið metir tó ikki, at eykainntøkan verður stór í sambandi við, at ferðaleiðarar skulu leggja meirvirðisgjald á sítt virksemi. Óvist er eisini, nær verulig gongd kemur á aftur ferðavinnuna og ferðaleiðaravirksemi eftir koronufarsóttina.

Svar til nr. 3
Við tað, at arbeitt verður við spurninginum, metir Fíggjarmálaráðið, at tað er ov tíðliga at siga, hvørjar broytingar landsstýrsmaðurin kemur at mæla til í heyst viðvíkjandi ferðavinnu, herundir eisini ferðaleiðarnum.

Tinganes, 29. mai 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum